# Nýggjur landslið svenjari í badminton

BADMINTON
*sportal.fo*

24 ára gamli danin, Jonas Gai, skal venja føroyska landsliðið fram til Oyggjaleikirnar komandi summar

Badmintonsamband Føroya hevur fingið ein nýggjan landsliðvenjara, sum skal fyrireika føroyska landsliðið til Oyggjaleikirnar í 2005. Talan er um 24 ára gamla Jonas Gai, sum longu er farin til verka í Føroyum.

Umframt at venja tað føroyska landsliðið skal Jonas Gai eisini vera venjari hjá badmintonfeløgunum í Havn, Vestmanna, Miðvági og Fuglafirði.

Í Havn fer hann at venja tær yngru deildirnar, men í hinum bygdunum fer hann at venja allar aldursbólkar.

### Breiddin

Badmintonsambandið hevur havt ein landsliðsvenjara úr India, nevndur Nandy Aritra, seinastu tvey árini, og hann hevur arbeitt nógv við elituni innan badminton ítróttin. Jonas Gai fer hinvegin at arbeiða meira við breiddini umframt at venja landsliðið.

Jonas Gai hevur tikið allar venjaraútbúgvingar innan badminton í Danmark umframt elituvenjaraskeið fyri stuttari tíð síðan.

– Vit fara í gongd við venjingarnar á landsliðnum um stutta tíð, men eftir jól fara vit undir meira miðvísa venjing, sigur Jonas Gai, sum júst er komin til landið.

Umframt at hava verið venjari í fleiri ár í Danmark hevur Jonas Gai eisini verið venjari í Skotlandi og Póllandi.



*Kanska verður tað Atli Danielsen, sum verður stóra kaninin hjá Henrik Larsen til dystin mikuvkøldið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Broytingarnar

**Føroyska liðið var broytt í mun til Malta-dystin, og líkt er eisini til, at talan verður um broytingar til dystin móti Fraklandi mikukvøldið**

LANDSLIÐIÐ
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var væntandi, at føroyska liðið skuldi broytast nakað til dystin móti Sveis. Fyrst og fremst, so skuldi pláss finnast fyri Claus Bech Jørgensen, og hetta kostaði Rógva Jacobsen plássið á miðvøllinum.

Tað mundi tó vera um reppið, at Rógvi kortini fór at fáa pláss á vøllinum. Sum skilst, so høvdu føroysku venjararnir rættiliga skjótt gjørt av, at fremsta álopsplássið skuldi mannast av Jónhard. Hetta tí hann er leikarin, sum við ferð síni kundi skapt nakað.

Hitt álopsplássið gjørdist so til ein spurningur um John Petersen, Rógva Jacobsen ella Andrew av Fløtum, og her varð John tikin framum hesaferð. So er spurningurin, hvørt tað eisini verður støðan mikudagin, tí Rógvi tóktist vera sera uppsettur upp á vísa, at hann eigur pláss millum teir fyrstu ellivu, og sum heimligi toppskjúttin hevur leikt í ár, so eigur hann eisini at banka heilt kraftiga uppá dyrnar í so máta.

Her hevur John kanska fyrimun í royndunum, men Rógvi er tó ikki heilt óroyndur longur, og verður talan um franskt trýst, har okkara í stóran mun koma at senda langt niðan, so er kanska upplagt, at Rógvi tá fær møguleikan.

Talan hevði helst ikki verið um at gjørt tær stóru broytingarnar í miðverjuni, men eftir avsmurningin slepst neyvan undan, at tann spurningurin eisini fer at verða havdur á lofti. Í øllum førum tóktust hvørki Pól ella Óli at vera á toppinum, meðan Jón Rói enn ikki hevur støðið, sum hann hevði undan skaðasteðginum. So er spurningurin, hvørt tað fer at kosa broytingar hesaferð, ella um venjararnir halda fast við royndu menninar, nú talan er um so trupla uppgávu, sum Frakland jú er.

Seinasti spurningurin undan dystinum var málverjaplássið, har Jens Martin hesaferð varð tikin framum. Kanska hevur skaðasteðgurin, sum Jákup Mikkelsen hevði herfyri, spælt inn í so máta, men klaksvíkingurin hevur tó staðið seg væl, síðani hann byrjaði aftur. Og her er kanska merkisvert, at Henrik Larsen hugdi at, tá KÍ við einum stórspælandi Jákupi Mikkelsen vann 2-0 í Gøtu næstseinasta umfarið, meðan Jógvan Martin Olsen sjálvur kundi gera sær sínar metingar, tá KÍ á heimavølli vann 1-0 á NSÍ bert tríggjar dagar undan fráferðini til Sveis.

Ivaleyst hava venjararnir tó undir venjingini mett, at Jens Martin hevur verið tað lítla pettið hvassari, men tað prógvaði hann so ikki undir dystinum. Ikki minst, so hevur Jákup tann stóra fyrimun, at hann er ein munandi betri bóltspælari, og tí kann hann í nógv størri mun takast við í spælið, tá ferðin skal takast av spælinum, eins og hann aloftast megnar at rudda væl og virðiliga, tá tørvur er á hesum.

Sum tað verður lagt upp til í prátinum við Henrik Larsen aðra staðni á hesum síðum, so verður talan helst um broytingar á liðnum, og her gita vit, at hesar verða tvær í tali.

Nevnliga at Jákup Mikkelsen verður settur at verja málið, og at Rógvi verður tikin framum John Petersen í álopspartinum. Hóast verjan var lítið sannførandi, so rokna vit við, at teir somu fýra halda sínum plássi her, tó at Atli Danielsen ella Johan Byrial Hansen kundu verið nýttir á bakkinum. Serliga, um Pól Thorsteinsson ikki er komin fyri seg, eftir at hann gekk við stívum nakka alt leygarkvøldið.

Miðvøllurin stóð seg heldur ikki av tí besta hesaferð, men tað verður tó neyvan her, at broytingar verða gjørdar. Heldur ikki hóast Atli Danielsen fekk pláss mitt á eina góða løtu í Sveis, meðan Julian loysti Jákup á Borg av høgrumegin. Móti Vieira & Co. verður helst merira enn nakrantíð tørvur á evnunum hjá Julian inni mitt á, og Fróði Benjaminsen verður neyvan fluttur av sínum plássi.

Ein heilt annar møguleiki kann tó vera, at uppstillingin á liðnum verður broytt til eina 4-3-3 ella 4-5-1. Tað kundi skapt rúm fyri Atla Danielsen saman við Fróða og Julian mitt á. Jákup á Borg og Claus Bech Jørgensen verða á kantunum, meðan tað so helst verður Rógvi Jacobsen, sum verður einsamallur center-forward.



# Tey smáu vórðu sett upp á pláss

**Burtursæð frá Aserbadjan og Ísrael megnaðu smáu tjóðirnar ikki at fáa stig, og hjá fleiri av teimum størstu gekk tað heldur einki serligt, tá ið sjøtul varð settur á nýggju HM undankappingina**

HM UNDANKAPPING
*Jóannes Hansen*

Ísrael fekk stig við úr París, og Aserbadjan, sum á altjóða styrkislistanum ikki er so langt frá Føroyum, megnaði á heimavølli 1-1 ímóti Wales. Burtursæð frá hesum góðu úrslitunum hjá teimum smáu ímóti teimum stóru, so skarst tað leygardagin einki serligt hjá smæstu europeisku fótbóltstjóðunum. Heldur ikki hjá teimum størstu gekk tað so ógvuliga væl. Flestu teirra, sum seinastu hálvu øldina hava vunnið EM og HM, megnaðu ikki at fáa fult hesa ferð. Hetta var galdandi fyri Danmark, Frakland, Ongland og ikki minst Grikkaland, sum einki stig fekk í fyrsta kappingardystinum, eftir at teir í summar vunnu EM endaspælið. Holland var ikki í eldinum, og Týskland skal ikki spæla undankapping. Sum vertir eru teir sjálvskrivaðir í endaspælinum um tvey ár.

Føroyska 6-0 tapið í Sveis var ikki tað største av øllum. Svøríki var á Malta, og sviar vístu onga náði. Úrslitið var sannførandi 7-0 sigur til Svøríki. Serliga var tað Zlatan Ibrahimovic, sum spískaði seg. Hann skoraði trý mál í 1. hálvleiki og fýra íalt.

Tvær ferðir var Allan Simonsen við føroyska landsliðnum í Estlani. Í fyrra førinum var talan um vinardyst, sum Føroyar vunnu 2-0. Í seinna førinum var talan um undankappingardyst, og tá vunnu estlendingar 5-0. Hesa ferð var Allan Simonsen við Luksemborg í Tallinn, og har vann heimaliðið 4-0.

Í okkara bólki hevði Írland vitjan av Kypros, sum varð sent til hús við 3-0 tapi. San Marino hevði vitjan av Serbia/Montenegro, og har vann tann størri eisini 3-0 á tí minna. Andorra vitjaði í Finnlandi, sum eisini vann 3-0. Liktinstein skal ikki í eldin fyrrenn í annaðkvøld, tá ið teir skulu spæla ímóti Slovakia.



*Zlatan Ibrahimovic skeyt fýra mál, tá Svøríki bukaði Malta av leygardagin*

*Mynd: Reuters*

### Vónbrot í Íslandi

Grannarnir fyri vestan høvdu undan vitjanini av Bulgaria góðar vónir, eftir at teir høvdu vunnið vinardyst ímóti Italia. Gamli stórspælarin hjá Bulgaria, Hristo Stoitchkov, er nýggjur landsliðsvenjari, og hann legði bragdliga fyri. Bulgaria vann 3-1. Einasta íslendska málið skoraði Eidur Gudjohnssen, tá ið hann tíðliga í 2. hálvleiki við brotssparki minkaði um munin til 2-1. Síðstu sjey minuttirnar vóru bara tíggju íslendingar á vøllinum, tí Bjørn Gunnarsson tvær ferðir hevði fingið gula kortið.

Noreg legði bragdliga fyri á útivølli í Italia. John Carew, sum áður hevur spælt í Roma, legði í fyrsta minutti Noreg á odda. FCK spælarin Magne Hoseth átti uppleggið. Men Italia skoraði tvey mál og tryggjaði sær harvið øll stigini.

Tað eydnaðist ikki Danmark at fáa fult á heimavølli ímóti Hvítarusslandi. Danir løgdu fyri í eyðkenda skjóta og sannførandi stílinum. Martin Jørgensen skoraði beinanvegin, og so var lagt upp til sannførandi heimasigur. Sum so mangan áður so megnaðu danir bara at halda guvuni í ein hálvleik. Hvítarussland javnaði eftir deyðbólt tíðliga í 2. hálvleiki, og um teir høvdu verið heilt hepnir, so høvdu teir fingið øll stigini. Men tað hevði verið ov mikið, tí Danmark hevði bóltin kanska 80 prosent av tíðini, og heimaliðið hevði flestu møguleikarnar.

Fyrsti venjarin hevur longu lagt frá sær í nýggju HM undankappingini. Tað er russiski venjarin, sum var vónbrotin eftir 1-1 á heimavølli ímóti Slovakia. Fyri russararnar var tað stórt vónbrot, at Slovakia javnaði minni enn tríggjar minuttir undan leikloki. Tá ið støðan var 1-0, misnýtti Russland brotsspark. Bjargingin hjá slovakiska málverjanum setti futt í hansara menn, sum altso javnaðu, og tað hevði við sær, at russiski venjarin legði frá sær, og at hjálparvenjarin tók ábyrgdina á seg.

Grikkar komu orduliga niður á jørðina, tá ið teir vitjaðu grannarnar fyri norðan og taptu 2-1. Albania legði seg beinanvegin framum 2-0, og hóast grikkar minkaðu um munin og høvdu allan 2. hálvleik at spæla seg til stig í, so miseydnaðist tað hjá teimum. Albania staðfesti, at teir avgjørt ikki skulu roknast millum smáu europeisku fótbóltstjóðirnar.

# Ísrael er ikki at spæla við

**Fransmenninir eru sperdir og ógvuliga svangir, tá ið teir í morgin fara á Tórsvøll at spæla ímóti illa sølaða føroyska liðnum**

HM BÓLKUR 4
*Jóannes Hansen*

Tað gekk ikki væl, tá ið franska landsliðið í nógv broyttari útgávu royndi at taka fyrsta stigið ímóti HM endaspælinum í Týsklandi um tvey ár.

Ísrael var mótstøðuliðið í París, og ísraelar undirstrikaðu staðiliga, at teir ikki longur teljast millum minstu fótbóltstjóðirnar.

Á franska liðnum var eingin Zinedine Zidane, eingin Lilian Thuram, eingin Marcel Desailly og eingin Bixente Lizarazu. Í málinum var Gregory Coupet og ikki Fabien Barthez, og á beinkinum var Raymond Domenech í staðin fyri Jacques Santini, sum er farin til London og Tottenham.

Fransmenninir vóru í 3-5-2 útgangsstøðu, og teir vóru ikki serliga sannførandi. Ísraelar dusaðu sær, og serliga í vinstru gekk væl hjá teimum at mynda álopsspæl. Patrick Vieira, Arsenal miðvallarkempan, sum nú er liðformaður á landsliðnum, hevði góða roynd við høvdinum, sum varð bjargað á strikuni. Vieira var annars ógvuliga tætt ansaður, og tað bar við sær, at hann ikki var so eyðsýndur, sum hann plagar at vera.

Ísraelska verjan var ógvuliga tøtt. Tað bar við sær, at fronsku álopsmenninir, Thierry Henry og Louis Saha, ofta fóru langt aftur á vøllin, og at miðvallararnir Robert Pires og Ludovic Giuly, so fóru longri fram, og tað var onkra ferðina vandamikið.

Men Ísreal hoyknaði ongantíð, og miðskeiðis í 2. hálvleiki var um reppið, at teir fingu hol á. Eftir horna stútaði Badir ímóti málinum, men á strikuni bjargaðu heimamenninir.

Síðstu løtuna setti Frakland rættuligt trýst á Ísrael, men verjan var sum bergið.